

*Kyndlakvinnur vunnu á StÍF, og hava nú fingið samband við ovastu liðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað stóð nógv á

**HONDBÓLTUR** Kyndil greiddi sína skyldu og fekk fult móti botnliðnum á útivølli. StÍF var hinvegin á odda í hálvleikinum. Uppflytararnir úr Kyndli hava nú fingið samband við ovastu liðini

Uni Holm Johannesen

Tað stóð nógv á Kyndli í hálvleikinum.

StÍF hevur bara fingið eitt stig í hesum kappingarárinum. Tað var púra óvæntað, tá kvinnurnar av Skálafjørðinum spældu javnt móti Tjaldrinum á útivølli.

Í flestu dystunum hevur StÍF tapt sannførandi.

Botnliðið var á odda 10-9 í hálvleikinum, tá Kyndil vitjaði í Ítróttarhøllini á Skála leygardagin. Grønlittu kvinnurnar úr høvuðsstaðnum hava vunnið seg nærri oddinum seinastu vikurnar, og tað var eitt krav, at tær fingu fult móti botnliðnum, um tær ikki skuldu missa fótafestið.

### Løgdu bragdliga fyri

Heimaliðið byrjaði væl.

Rebekka Justinussen gekk aftur fremst hjá StÍF, og hon var ein støðug hóttan í álopsspælinum. Eingin ansaði Justinussen, og hon hevði ofta gott pláss, tá hon sendi framvið málverjanum hjá Kyndli. Hon fekk 10 mál í alt.

Tað var lítið veiggj í álopsspælinum hjá gestunum. Tað var lítið ferð á spælinum, og tá tær langt um leingi sluppu til upplagdar málmøguleikar, so misnýttu tær.

### Riggaði betur

Kyndil trýsti beinanvegin í seinna hálvleiki, og spælið var nógv meira skipað. Í smáum fóru gestirnir undan, og tá hálvleikurin var hálvrunnin var avgjørt. Kyndil var á odda 19-15, og StÍF hótti ongantíð aftur.

Endaliga úrslitið var 28-21.

*uni@sosialurin.fo*

# Lætt og einfalt

**HONDBÓLTUR** Stjørnan gjørdi bart seinasta løtuna í fyrra hálvleiki, og kvinnurnar úr Vestmanna hóttu ongantíð aftur

Uni Holm Johannesen

Stjørnan er framvegis fremst í bestu kvinnudeildini.

Tað høvdu kvinnurnar úr Klaksvík eisini verið, um tær snávaðu í Vestmanna um vikuskiftið.

Stjørnan fekk tvey stig í skjáttuna afturat í gjár.

Valentina Suciu gekk á odda, tá føroyameistaranir vunnu lætt og einfalt. Gestirnir spældu við fullari megi seinastu løtuna í seinna hálvleiki, og frá 7-10 og upp á 10-19.

### VÍF í trongum skóm

VÍF hevur ikki lagt serliga væl frá landi í hesum kappingarárinum.

Liðið hevur bara fingið fýra stig í fyrstu átta landskappingardystunum, og øll stigini eru vunnin móti StÍF, sum er botnlið.

Miðalaldurin er framvegis lágur í Vestmanna, og Liljan Djurhuus tykist vera eins væl fyri í ár, sum í fjør.

VÍF fær vitjan av Neistanum mikudagin.

### Stjørnan og Kyndil

Kyndil og Stjørnan spæla í høllini á Hálsi mikudagin.

Kyndil hevur vunnið fleiri dystir upp í slag, og liðið hevur vunnið seg nærri oddinum.

Høvuðsstaðarliðið fær seg veruligt roynt, men ungu kvinnurnar við stórum sjálvaliti verður ikki ein løtt uppgáva hjá Stjørnuni.

*uni@sosialurin.fo*

# Tjaldur aftur á beint

**HONDBÓLTUR** Tað sá einki út. Úrtøkan var trý stig av átta møguligum, tá nevndin valdi at senda Bogdan Burcea til hús. Nú hevur Tjaldur vunnið tvær ferðir upp í slag

Uni Holm Johannesen

Tað, sum eina ferð sá strævið út, er aftur hugaligt.

Tjaldur var lítið sannførandi fyrstu landskappingardystirnar. Tapini fyri Neistanum og Stjørnuni, og javnleikurin móti botnliðnum StÍF, var nóg mikið hjá nevndini. Bogdan Burcea, sum hevur átt týdningarmiklan leiklut í stóru framgondini, sum hondbóltsfelagið hevur havt seinastu árini, varð sendur til hús.

Trygvi Mortensen loysti hann av.

Venjaraskiftið riggaði væl.

Tjaldur er aftur har, tað er stuttligt.

### VB manglar tað síðsta

VB hevur verið við í oddastríðnum seinastu árini.

Tað verður ikki teirra leiklutur í hesum kappingarárinum.

Kvinnurnar úr Vági missa ov nógv stig, og tað hevur serliga ikki gingið væl í dystunum móti ovastu liðunum. Tað fingu tær staðfest aftur leygardagin.

### Runnu undan

Tað var í seinna hálvleiki, at gestirnir úr Runavík runnu undan í gjár.

Liðini fylgdust meira ella minni undan hvíldini, men Tjaldur setti ferðina upp aftaná steðgin.

Tað var merkisvert, at tað vóru bara fimm ymiskir málskjúttar hjá gestunum. Cormelia Rimbu, Simona Petersen, Adina Petrea, Annika Thomsen og Jóhanna í Króki vóru tær einastu, sum skutu málini hjá Tjaldur.

Tjaldur vann sær trygga leiðslu, og hóast heimaliðið vann nøkur mál aftur seinastu løtuna, so hótti VB ongantíð leiðsluna.

Tjaldur er nú nummar tvey og á finalukós. Kvinnurnar úr Runavík hava sama stigatal sum Neistin, ið er nummar trý.

*uni@sosialurin.fo*

## VÍF – Stjørnan 25-32 (10-19)

Dómarar: Thomas Juul Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 7-5**
**20 min.: 7-13**
**40 min.: 15-23**
**50 min.: 21-25**

**VÍF:** Liljan Djurhuus 7, Torgunn Johansen 5, Elisa Leo 4, Agnas Olsen 3, Rakul Joensen 3, Halla Durhuus 2, Tóra Seloy.
**Stjørnan:** Valentina Suciu 8, Nicoletta R. Hansen 7, Durita Christophersen 4, Judit Hansen 3, Edith Hansen 3, Ella Petersen 2, Durita Ljósstein 2, Una Olsen 2, Anna Kristina Samson 1.
Útvísingar: VÍF 1 – Stjørnan 3

## VB – Tjaldur 21-25 (10-12)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen

**10 min.: 3-4**
**20 min.: 6-7**
**40 min.: 14-15**
**50 min.: 15-23**

**VB:** Bára K. Mortensen 4, Gintare Lydekaite 3, Gurið K. Mortensen 3, Svava Vestergaard 3, Rannvá Johannesen 2, Helga Kjærbo 2, Justina Balzarviciute 2, Una Egilsdóttir 1, Andrea Nielsen 1.
**Tjaldur:** Cormelia Rimbu 8, Simona Petersen 7, Adina Petrea 6, Annika Thomsen 3, Jóhanna í Króki 1.
Útvísingar: VB 3 – Tjaldur 3

## StÍF – Kyndil 21-28 (10-9)

**Kyndil:** Heidi Maria Akselsen 7, Jórun Ludvig 7, Anja 5, Randi Wardum 3, Súsanna 3, Rannvá 2 og Guðrið 1

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 8 | 240 | 193 | 47 | 14 |
| 2 | Tjaldur | 8 | 220 | 183 | 37 | 11 |
| 3 | Neistin | 8 | 222 | 202 | 20 | 11 |
| 4 | Kyndil | 9 | 226 | 202 | 24 | 10 |
| 5 | VB | 9 | 224 | 240 | -16 | 7 |
| 6 | VÍF | 8 | 192 | 228 | -36 | 4 |
| 7 | StÍF | 8 | 160 | 236 | -76 | 1 |